# Eg eri ein modernað




**– Fólk her niðri flenna og siga, at hasir føroyingarnir vita ikki, hvønn teir hava sett í starv, sigur Kristine Stricker Hestbeck skemtandi. Kendi danski presturin fer at avloysa í Dómkirkuni komandi hálva árið**

TRÚARLÍV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

- Mín missión sum prestur er at formidla evangeliið, so fólk kunnu nerta tað við hondunum og kenna, at hetta er viðkomandi fyri teirra egna lítla lív á hesi løgnu jørð. Hetta sigur kendi og orðkringi danski presturin Kristine Stricker Hestbeck, sum verður avloysari í Suðurstreymoyar Eystara Prestagjaldi komandi hálva árið, har hon avloysir Marjuna Lómaklett, sum fer í barnsburðarfarloyvi.

## Livandi kirkjan

Nýggi presturin sigur seg onga ímynd hava av, hvussu tað er í Føroyum,.

- Men eg havi altíð verið bergtikin av náttúruni har uppi. Og so, at Føroyar eru ein partur av ríkisfelagsskapinum, og kortini so fullkomiliga øðrvísi, sigur Kristine Stricker Hestbech. Men hon hevur eina hóming av, at føroyska kirkja er ikki so modernað, sum tann danska.

– Fólk her niðri siga, at tit vita ikki, hvat tit hava sett í starv har uppi, flennir hon, og leggur afturat, at sjálv ynskir hon sær, at kirkja er ein livandi og nærverandi partur av tilveruni hjá fólki her og nú. Fólk skulu kenna seg aftur í kirkjuni, sum sjálvandi eisini skal umboða tryggleika og tradition.

- Føroyingar hava ikki sokallaða 1992 ritualið, men 1912 ritualið. Hetta merkir, at í Danmark fóru stórar broytingar fram í 1992, tá málburður og ritualini vórðu moderniseraði. Hetta sigur mær somikið, at talan er um eina konservatismu í sambandi við ritualir og siðvenjur, hugleiðir Kristine Stricker Hestbech, og skoytir upp í, at hon sjálv er ein sera modernaður prestur.

– Tí hevur tað ikki avgerandi týdning fyri meg, um eitthvørt hevur verið galdandi í 500 ár, sigur Kristine Stricker Hestbech, sum heldur, at kirkjan skal vera eitt stillarúm í einum gerandisdegi, har alt annað gongur við rúkandi ferð.

- Tá alt er kaos uttanfyri, skal friðurin valda og tíðin ganga spakuligari í kirkjuni, sigur hon.

## Kendur prestur

At koma til Føroya at virka sum prestur er ein gamal dreymur, sum hevur fylgt Kristine Stricker Hestbech øll árini, síðani hon læs teologi í Århus.

- Men eg vildi ikki gera tað, meðan døturnar vóru smáar. Nú tær eru so vaksnar, kann eg vera burtur frá teimum í eitt hálvt ár, sigur Kristine Stricker Hestbech, sum segði frá sær fasta starvið sum prestur í Suðursælandi á nýggjárinum. Síðani hevur hon verið freelancari, hevur hildið fyrilestrar og verið við í kommisiónini um arbeiðs- og familjulív, samstundis sum hon hevur lokið prógv sum psykoterapeutur.

Kristine Hestbech ikki hvør sum helst. Hon er kendur fyrilestrahaldari í